*Árni Jacobsen*

# So skrivið!

Er lívið eitt lán, sum tit kenna sum givið
　　　　— so skrivið
er alt kanska trupult og fløkjasligt blivið
　　　　— so skrivið
um tilveran hevur at eggini drivið
　　　　— so skrivið
er innistongt sinnið og sálin sum klivi
　　　　— so skrivið
og kenst eins og teppið alt undan er rivið
　　　　— so skrivið
ja, hava tit eins og í leysa luft trivið
　　　　— so skrivið
og funnu tit gull fram úr sandinum grivið
　　　　— so skrivið

© *Árni Jacobsen* 2003. All rights reserved.
*Tað er strangliga banna at nýta tekstin, ella partar av honum, uttan at høvundan loyvi.*